

*Johan Mortensen, Vilhelm Petersen og Pauli Einarsson, nevndarlimir í Føroya Oljuídnað standa fyri fyrireikingunum av fyrstu veruligu oljuráðstevnuni í Føroyum. Mynd Jens Kr. Vang*

# Stór oljuráðstevna í Norðurlandahúsinum

*Tann 5. og 6. mars verður fyrsta stóra oljuráðstevnan í Føroyum hildin í Norðurlandahúsinum. Tað er Føroya Oljuídnaður, sum stendur fyri tiltakinum, sum verður sponsorerað av Amerada Hess oljusamtakinum. Roknað verður við umleið 300 luttakarum, teirra millum 30 úr útlandinum.*

JAN MÜLLER
JENS KR. VANG

Norðurlandahúsið verður karmur um olju í tveir dagar í mars mánað. Mikudagin 5. og hósdagin 6. mars skipar Føroya Oljuídnaður fyri eini oljuráðstevnu. Roknað verður við stórari luttøku, nú áhugin fyri eini komandi oljuvinnu er vaksandi. Stigtakararnir rokna við umleið 300 luttakarum, harav eru 30 úr útlandinum. Talan er fyrst og fremst um limir í Føroya Oljuídnað, tvs. bæði einstaklingar, feløg, stovnar o.o., men eisini onnur innboðin er við. Stevnan er ikki opin fyri almenninginum.

Tað er Amerada Hess-bólkurin, sum sponsorerar ráðstevnuna tvs. m.a. stendur fyri kostnaðinum av henni. Í hesum bólkinum, sum nú kallar seg „The Faroes Partnership" og sum hevur fingið sítt egna búmerki, eru tey fýra oljufeløgini, Amerada Hess, Lasmo, Norsk Hydro og Dong.

Ráðstevnan verður hildin undir heitinum „Resourcing Oil And Gas Operations – Process and Planning.

**Upplýsing og orðaskifti**

Pauli Einarsson, formaður í Føroya Oljuídnað, sigur, at endamálið við ráðstevnuni er at upplýsa um og umrøða teir møguleikar, sum eru hjá føroyskum vinnulívi í fyrsta lagi í leitingartíðaskeiðnum og í øðrum lagi, tá og um olja og gass verða funnin.

Útlendsku umboðini, sum verða við á ráðtevnuni, eru frá teimum fýra oljufeløgunum og frá øðrum fyritøkum, sum arbeiða í oljuvinnuni, her serstakliga kontraktorfeløg sum eitt nú Sonat, Kværner og Western Atlas. Eisini verða umboð fyri Orknoyggjar, sum fara at greiða frá, hvussu oljuvinnan hevur ment seg har og hvørjar møguleikar hon hevur skapt í hesum oyggjunum.

Á ráðstevnuni verða fyrilestar og orðaskifti. Í tí stóra orðaskiftinum seinna dagin verða bæði føroyingar og útlendingar. Føroysku luttakararnir har eru Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum, Arne Poulsen, vinnumálastjóri og Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini.

Samstundis sum ráðstevnan verður hildin verður eisini ein minni ráðstevna um útbúgving. Henda er ætlað ungdóminum og fara har at verða fólk frá miðnámsskúlum. Føroya Oljuídnaður skipar fyri hesum tiltakinum saman við Fróðskaparsetrinum.

Pauli Einarsson vónar, at ráðstevnan verður væleydnað og sær fegin, at nógvir av limunum í Føroya Oljuídnað møta upp. Í dag eru har meira enn 150 limir. Hann vísir á, at slík ráðstevna er ein týðandi partur av arbeiðinum hjá Føroya Oljuídnað og eru teir í løtuni við at fyrireika onnur líknandi tiltøk í næstu framtíð.

-Vit hava longu skipað fyri onkrum stevnum og halda, at hesar hava stóran týdning fyri føroyskt vinnulív. Seminarið um avtalur í oljuvinnuni, sum vit skipaðu fyri saman við Phillips Petroleum var sera væl eydnað sigur formaðurin í Føroya Oljuídnað.

**Vinnulívið má við**

Pauli Einarsson heldur tað er av stórum týdningi, at vit fáa eitt breitt orðaskifti um hesa nýggju vinnu.

-Upplýsing og orðaskifti eru tvær týðandi fortreytir fyri at kunna fara undir eina oljuvinnu, og vit í Føroya Oljuídnað vilja gera okkara til at lúka hesar fortreytir.

Pauli Einarsson heldur tað hevur stóran týdning at føroyskt vinnulív longu nú lagar seg til eina komandi oljuvinnu. Her eru nógvar uppgávur og hann ávarar móti at lata útlendskum fyritøkum alt arbeiði, sum hevur tilknýti til oljuvinnuna.

Hann heldur, at vit eiga at læra av teimum mistøkum, sum vit longu hava gjørt og sipar her til boriverkætlanina í Lopra.

-Har bóru vit okkum skeivt at. Ístaðin fyri at fara av landinum við uppgávuni at standa fyri hesi spennandi verkætlanini, so áttu vit at latið hana upp í hendur á føroyskari fyritøku. T.d. hevði Landsverkfrøðingsstovnurin verið eitt gott boð uppá at samskipa fyri eini slíkari verkætlan. Nettup hetta at geva føroyskum fyritøkum slíkar avbjóðingar ger, at vit búnast og vera betri førir fyri at taka ímóti nýggjum avbjóðingum í framtíðini. Bert við at vera við sjálvir kunnu vit læra okkum handverkið og harvið fáa størri lut í inntøkunum, sum eitt oljuvirksemi skapar.

Pauli Einarsson sigur annars, at tað er avgerandi fyri føroyskt vinnulív, at teir, sum koma at stýra eini oljuvinnu eitt nú við at gera eina løggávu og seinni treytir til oljufeløgini, skipa viðurskiftini soleiðis, at vinnufyritøkur her á landi sleppa upp í part og ikki avreiða alt arbeiði til útlendskar fyritøkur.

Formaðurin í Føroya Oljuídnað heldur fyri, at vit eiga at umhugsa at stovna eitt føroyskt oljufelag, alment ella privat ella bæði tvey. Eitt slíkt felag kann nevniliga fáa stóran týdning fyri føroyskt vinnulív og samfelagið sum heild.

-Oljuráðstevnan í Norðurlandahúsinum verður vónandi ein góð byrjan uppá tað orðaskifti, sum so mong sakna sigur Pauli Einarsson, sum saman við Johan Mortensen og Vilhelm Petersen, nevndarlimum í FOÍ hava staðið fyri fyrireikingunum av stevnuni.

Bílig føroysk konfirmatiónskort
í heilsølu
G. J. Heinesen
umboð & heilsøla
Tlf. 11644 · 16226

Krambakvinna
søkist sum skjótast at arbeiða 1/2 dag í tógvhandli í Havn
Tlf. 15264

Nýtt Nýtt
TWILL
SMEKKUBUKSUR
std. 6–16 ár.
Litir:
svart, hvítt, orange, gult, grønt og blátt
kr. 199,-
DADDAN
Á HÁLSI
SMYRILSVEGUR 7
TLF. 12138

Landsfundurin
er fluttur til Klaksvíkar og verður í døgunum 11. og 12. apríl.
FØROYA JAVNAÐARFELAG

